## Sílini skulu bjarga Alilaks

Eins og flestu alifyritøkur í landinum, so hevði P/F Alilaks í Fuglafirði hall í rakstrinum í fjør. Endaliga úrslitið í roknskapinum gjørdist tó positivt við 1.163 tkr., men í hesum tali var roknað ein inntøkuføring upp á 8.650 tkr. úr endurgjaldsgrunni alivinnurnar.

Við hesum tykist felagið hava steðgað sínum parti av niðurgongdini, eftir at úrslitið fyri 2003 var eitt hall upp á 16.567 tkr.

Hóast tað í løtuni er trupult at meta um framtíðarvánirnar fyri aling í Føroyum, so vónar leiðslan í felagnum, at tað skal bera til at fáa avlop í rakstrinum í inniverandi ári. Einamest, tí prísirnir fyri ald síl tykjast vera góðir á japanska marknaðinum.

Eginpeningurin hjá Alilaks var við árslok 2004 6.908 tkr. Tá er partapeningurin - íroknað uppskrivingarburturleggingar - á 10.000 tkr. tikin við. Í nevndini sita Olaf Olsen, Óli Hansen og Jógvan Ziska Djurhuus. Frímund Hansen er stjóri.

-jm

## Gott asfalt-úrslit

Sp/f EM-asfalt við Edvard Mikkelsen í Søldarfirði hevði eitt gott fíggjarárár í 2004. Samlaða avlopið eftir skatt var 2.002 tkr., sum er nakað betri enn fyri 2003. Eftir at vinningsbýti á 500 tkr. er goldið, er bókaði eginpeningurin í fyritøkuni 3.457 tkr.

15 fólk starvast hjá fyritøkuni, sum í 2004 hevði samlaðar lønarútjgaldingar á góðar 4 mió kr.

-jm

# I AM á hollendskari heimasíðu



*I AM er nú sloppið fram at einari hollendskari heimasíðu, sum skrivar um norðurlendska mentan*

Føroyski gospelbólkurin verður í hesum døgum umrøddur á hollendskari heimasíðu, og har ber eisini til at taka tónleik hjá bólkinum niður á telduna

Hollendska heimasíðan umrøður norðurlendska mentan, og heimasíðan hevur millum annað tikið føroyska gospelbólkin I AM fram.

Greinarnar eru á hollendskum, men tað ber eisini til at taka tvey løg hjá I AM niður á telduna at lurta eftir.

Heimasíðan hevur adressuna: www.ratatoskonline.net

# Silly Boys í Klaksvík

**Fyri fyrstu ferð í 30 ár verða Silly Boys at hoyra í Klaksvík tann 28. maj**

DAGFINN OLSEN
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tann 28. maj vitja Silly Boys í Klaksvíkar Klubba. Tað eru 30 ár síðani, at bólkurin seinast var at hoyra í Klaksvík.

Teir, ið mannað bólkin eru: Torkil Johannessen, trummur, Jónsvein Poulsen, bass, Óli Johannessen, guitar, Magnus Jakobsen, guitar og Stanley Samuelsen, sang og guitar. Kvøldið byrjar kl 20 við vísusangi, har Stanley Samuelsen og aðrir luttaka. Dansurin byrjar uml. kl. 24:00.

Tiltakið verður skipað sum gamlamannadansur og er aldursmarkið sett til 20 ár Tiltakið er alment og øll eru vælkomin, siga tey í Klaksvíkar Klubba.

# Musikkskúlin í Suðuroynni endakonsert

**Týskvøldið 24. maj endar Musikkskúlin í Suðuroynni við einum stórum tiltaki í Trongisvági**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Týskvøldið 24. maj klokkan 17 verður stórt tiltak í Trongisvágshøllini. Tá hevur Musikkskúlin í Suðuroynni endakonsert og nógv er á skránni.

Frá klokkan 17 til 19 eru klavernæmingar á skránni og eisini koma blásarar á pall av og á. Klokkan 19:30 fara ymsu skúlaorkestrini á pall.

Árið er so at enda, men enn er óvíst, um ikki okkurt tiltak bíðar musikkskúlanæmingum. Eittnú er jóansøka á skránni og eisini vitja Frederik og Mary í Suðuroynni, og kanska skal blásast, hvør veit?

# Stórur áhugi fyri Pilates-venjingum

Áhugin fyri Pilates-venjingarháttinum og íðkanum við Swiss-ball tykist vera ovurhonds stórur í Føroyum.

Fyri fáum vikum síðani var Hanna Dalsgaard, instruktørur, í Føroyum, har hon hevði skeið í venjingarhættunum, og ikki kann sigast annað enn, at undirtøkan var góð.

Í øllum førum eru næstu skeiðini longu sett á skránna, og verða hesi hildin í vikuskiftið, 27. – 29. mai.

Byrjarar hava møguleika at nema sær kunnleika til venjingarhættirnar fríggjadagin og leygardagin, og sunnudagin verður sonevnda víðkaða skeiðið í Pilatesvenjingum. Tá verður eisini venjing við Swiss-bóltum á skránni.

Afturat hesum verður eisini talan um blandaðar venjingar við bæði Pilates og bóltum verða nýtt. Hetta er eitt skeið, sum allir íðkarar kunnu fáa gagn av, men Hanna sigur tó, at talan er um eitt støði, sum líkist byrjunarstøði, og har tey flestu tí eisini kunnu taka lut.

-jm

## Kostar at hava hús

P/F Leif Mohr hevði í 2004 eitt ársúrslit á 1.570 tkr. Hetta er nakað væl minni, enn felagið hevði í 2003, tá úrslitið var 3.866 tkr., men partvíst stavar hetta frá viðlíkahaldsarbeiði av bygningi felagsins.

Hóast leiðslan í ársfrágreiðingini kallar úrslitið fyri partvíst nøktandi, so er einki at ivast í, at talan er um væl konsolideraða fyritøku. Av samlaða fíggjarjavnanum á 36.213 tkr., telir eginpeningurin heili 22.729 tkr. Á leið hálvt hundrað fólk arbeiða í konsernini, har Leivur Holm er stjóri. Nevndalimir í felagnum eru - umframt Leivur Holm - Høgni Mohr og Jákup Magnussen.

-jm

## Væl konsolideraðir trolarar

P/F Meðalsbrekka við Tummas Christophers í Vestmanna, sum eigur rekur teir báðar trolararnar, Vestmenning og Fram, hevði í fjør eitt avlop á 4.715 tkr. Hetta mótvegis einum halli á 324 tkr. í 2003.

Í ársfrágreiðingini sigur leiðslan, at úrslitið er nøktandi, og at roknað verður við á leið sama úrsliti fyri 2005.

Felagið, sum í ár letur 1.000 tkr. í vinningsbýti til eigararnar, hevði við árslok 2004 onga skuld av týdningi. Skipini, sum sambært roknskapinum hava eitt útveganarvirði á góðar 26 mió kr., eru í roknskapinum virðissett til stívliga 19 mió kr., og er samlaði eginpeningurin hjá felagnum 38.826 tkr.

-jm